

# HEILSUVERKSSTJÓRI

Fyri at tryggja dygdargóðar og samanhangandi veitingar í heilsuverkinum og fyri at tryggja, at játtanin til heilsuøkið verður brúkt so skynsamt sum møguligt, verður heilsuverkið skipað undir einum stjóra. Stjórin fær í fyrstu syftu yvirskipaðu umsitingarligu leiðsluna innan sjúkrahúsøkið og serviðgerðini uttanlands. Í aðru syftu er ætlanin, at stjórin fær umsitingarligu leiðsluna av øðrum pørtum av heilsuverkinum.

Í hesum sambandi verður nýggja starvið sum stjóri í Heilsuverki Føroya lýst leyst til at seta eftir nærri avtalu.

HØVUÐSUPPGÁVUR STJÓRANS ERU M.A.

- at tryggja eina greiða leiðsluábyrgd innan Heilsuverkið
- at tryggja, at Heilsuverkið virkar sum ein eind
- at tryggja, at tilfeingið (peningur, starvsfólk og høli) verður gagnnýtt á besta hátt
- at tryggja eina miðvísa menningartilgongd og góðskutrygging fyri Heilsuverkið
- at tryggja eina greiða, eintýdda og samanhangandi skipan í Heilsuverkinum, við atliti at sjúklingagongd o.ø.

ÁBYRGDIR OG HEIMILDIR STJÓRANS ERU M.A.

- at hava evstu ábyrgd mótvegis Heilsumálaráðnum viðvíkjandi fyrisitingar-, fíggjar- og starvsfólkamálum
- at hava yvirskipaðu umsitingarligu leiðsluna av Heilsuverkinum og at vera sambindingarlið millum Heilsumálaráðið og Heilsuverkið
- at hava rætt og skyldu til at taka stig á øllum økjum í Heilsuverkinum
- at hava endaligu ábyrgdina av rakstrinum av Heilsuverkinum mótvegis Heilsumálaráðnum
- at hava ábyrgdina av, hvussu Heilsuverkið verður skipað innanhýsis, og at hetta verður gjørt í samráði við Heilsumálaráðið

YNSKILIG FØRLEIKAKRØV TIL UMSØKJARAR

- útbúgving frá hægri lærustovni innan búskap, samfelagsvísindi, heilsuvísindi ella annað viðkomandi øki
- leiðsluútbúgving og leiðsluroyndir
- innlit í virksemi og stýring á heilsuøkinum
- innlit í fíggjarstýring og heilsubúskap
- vitan um tær treytir, sum galda í politiskari fyrisiting
- hava góða heildarfatan og mennandi leiðsluhátt
- góð leiðslu- og samstarvsevni
- góðar samskiftis- og semjuførleikar
- evni at seta í verk fyriskipanir
- duga at virka í almennum og politiskum umhvørvi

LØNAR- OG SETANARTREYTIR
Starvið sum heilsuverksstjóri er áramálsett í fimm ár og verður lønt eftir 38. lønarflokki hjá tænastumonnum, tó uttan at vera tænastumannastarv. Eftirlønargjaldið er 15%, og harumframt verður veitt áramálsviðbót, sum avtala verður gjørd um.

Setanarøkið er Heilsumálaráðið og stovnar undir tí. Heilsuverksstjórin vísir til aðalstjóran í Heilsumálaráðnum.

MEIRA AT VITA
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Poul Geert Hansen, aðalstjóra, ella Andrass Holm Arge, starvsfólkastjóra, á tlf. 30 40 50.

UMSÓKNIR
Umsóknir við C.V. og avritum av neyðugum skjølum skulu sendast til:

Heilsumálaráðið, Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2, 100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 28. november 2008 klokkan 12.00.

HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Eirargarður 2 · FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 · Fax: +298 354045 · ahr@ahr.fo

SENDISTOVAN


# Hevur tú hug at síggja sjónvarp í sera høgari góðsku?

## ...so skal tú ogna tær HDTV!



**HDTV gevur klárari, djúpari og hvassari sjónvarps-upplivingar - flottari gerst tað ikki!**

Tilboð 339,- kr./mðr.*

FAMILY MED CANAL+ TOTAL 369 kr./md.*

HD HDTV-kanaler

NYHED Fra d. 1. december

## Hvør loysn passar best til tín?



**HDTV boks: 995 kr.**
Við hesi HDTV boksini hevur tú møguleika at síggja HDTV í sera høgari HD-góðsku.



**HDTV boks v/ harddiski: 1.995 kr.**
Við hesi HDTV boksini kanst tú síggja HDTV í sera høgari HD-góðsku, umframt at tú kanst pausa, spola og taka upp.

Fyri at síggja FAMILY við CANAL+ TOTAL skal tú hava eina parabol

1.195 kr.



*Tilboðið inniber 12 mðr. hald av FAMILY MED CANAL+TOTAL. Goldið verður fyri TV-pakkan, hálvt ár av korttænastu, umframt upprætting á 390 kr. + seinna hálvár av korttænastu á 389 kr.

Canal Digital

**RADIOHANDILIN**
N. Finsensgøta 16
Tórshavn
Tel. 318277

**OPUS**
Heiðavegur 3
Runavík
Tel. 479999

**G.F. ELEKTRONIK**
Birnugøta 31
Tórshavn
Tel. 310254

**MPTEKNIK**
Bumshamarsvegur 7
Klaksvík
Tel. 459089

**expert** - vit vita
Húsagøta 2
Tórshavn
Tel. 353535

**RADIO SERVICE**
Vágur
Tel. 213500

**el-in**
Klingrugarður 8
Klaksvík
Tel. 474500